TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum 2017 | 2 |
| 2 | Innlendis- og økismenning av ferðavinnuni og verkætlan í Suðuroynni í hesum sambandi | 2 |
| 3 | Uppskot til Tilbúgvingarpolitikk og tilbúgvingarætlan hjá Tvøroyrar kommunu | 4 |
| 4 | Útibarnagarðurin og útbygging av barnagarðinum | 5 |
| 5 | Vinnugreinabýti og arbeiðsleys á Tvøroyri 2015/2016 | 7 |
| 6 | Broyting av byggisamtyktini í Trongisvági - matr. nr. 144ai og 144ak verða broytt til øki E "almennir stovnar" | 8 |
| 7 | Eykajáttan juni 2017 - til íløgur | 9 |
| 8 | Fíggjarætlan 2018 Bókasavnið | 10 |
| 9 | Endurskoða fíggjarætlan 2017 fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy | 10 |
| 10 | VIRÐIS- OG VISJÓNSTILGANGUR Á TVØROYRI-VERKSTOVUNA. | 12 |




Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 8/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-I00-1-17**

## 1. Samanbering av skattatølum 2017

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri juni og í árinum sum heild.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2016-2017.xls

**24.05.00-P20-1-17**

## 2. Innlendis- og økismenning av ferðavinnuni og verkætlan í Suðuroynni í hesum sambandi

### Málsfrágreiðing

Theresa Turidardóttir Kreutzmann og Ingibjørg Berg hava verið á nøkrum fundum við Býráðið og vinnu- og havnanevndina, og seinast saman við umboðum fyri Hvalbiar kommunu, har Theresa og Ingibjørg hava greitt frá um teirra uppskot til verkætlan til innlendis- og økismenning av ferðavinnuni í Suðuroynni. Samlaður kostnaður kr. 650.000,- + mvg - kr. 250.000,- í 2017 og kr. 400.000,- í 2018, sí viðfestu verkætlanarlýsing..



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 9/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**xxx mælir til,**

**Vinnu- og havnanevnd, 1. maj 2017, pkt. 5:**
Í samband við at Ingibjørg Berg og Theresa T. Kreutzmann hava vitjað, ynskir nevndin at fáa tær aftur á fund at greiða frá víðari um innlendis- og økismenning.

**Vinnu- og havnanevnd, 6. juni 2017, pkt. 6:**
Nevndin er kunnað um uppskotið frá CommIT, og mælir til at arbeiða víðari við málinum. Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 4:**
Fíggjarnevndin samtykti, at verkætlanarlýsingin er áhugaverd, og ynskir at bjóða Theresu T. Kreutzmann og Ingibjørg Berg suður á fund, at leggja fram ætlanina fyri Býráðnum á komandi býráðsfundi mánadagin 12. juni kl. 16:00.

**Býráðið, 12. juni 2017, pkt. 2:**
Kunning og málið verður avgreitt á komandi býráðsfundi áðrenn summarferiuna.

**Fíggjarnevndin, 12. juli 2017, pkt. 8:**

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini soleiðis at stig 1 í verkætlanini um at menna ferðavinnuna í Suðuroynni, sum Theresa T. Kreutzmann og Ingibjørg Berg standa fyri, kann byrja í september 2017 til ein kostnað á 250 tús. kr. + mvg. Stig 2 og 3 í verkætlanani til ein kostnað á 400 tús. kr. kann byrja í 2018 og at fígging verður sett av til hetta endamál á fíggjarætlanini fyri 2018.

Fíggjarnevndin mælir til, at Tvøroyrar kommuna útvegar høli til hetta arbeiði.

Fíggjarnevndin mælir eisini til, at aðrar kommunur í Suðuroynni eru vælkomnar við í hesa verkætlan, um áhugi er fyri tí, og at gjaldið fyri at vera við fylgir fólkatalinum.

Fíggjarnevndin mælir samtíðis til, at Tvøroyrar kommuna fer úr Suðuroyar Ferðavinnufelag pr. 1. januar 2018.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og fíggjarnevndini, at taka av prísuppskoti í sambandi við verkætlan til innlendis- og økismenning av ferðavinnuni í Suðuroynni, sum Theresa T. Kreutzmann og Ingibjørg Berg standa fyri.

### Skjøl

- Uppskot Tvøroyar Kommuna
- Váttan frá Ingibjørg Berg um fund

**14.00.00-A00-4-16**

## 3. Uppskot til Tilbúgvingarpolitikk og tilbúgvingarætlan hjá Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

Arbeiðið við at tilevna eina yvirskipaða tilbúgvingarætlan fyri Tvøroyrar kommunu byrjaði í fjør heyst, tí ein tílík ætlan manglaði og tí at kommunur sambært tilbúgvingarlógini kapittul 3 hava skyldu til at hava eina tilbúgvingarætlan. Aftaná eldin í Varðanum Pelagic tann 9. juni er arbeiði við tilbúgvingarætlanini tikið upp aftur. Í hesum sambandi eru seinastu vikurnar hildnir fundir um skipan av tilbúgvingini í Tvøroyrar kommunu bæði innanhýsis og við uttanhýsis samstarvspartar eitt nú Varðan Pelagic, Strandfaraskip Landsins, Suðuroyar Sjúkrahús, politiið og Effo.

Nú er so gjørt uppskot til ein yvirskipaðan tilbúgvingarpolitikk, sum tekur støði í tilbúgvingarlógini, og vísandi til lóg og politikk á økinum er eisini gjørt uppskot til eina yvirskipaða tilbúgvingarætlan fyri Tvøroyrar kommunu, sí viðfestu skjøl. Tilbúgvingarætlanir og mannagongdir hjá rakstrarstøðum í kommununi og hjá uttanhýsis samstarvspørtum vísa til og skulu leggjast afturat yvirskipaðu tilbúgvingarætlanini hjá Tvøroyrar kommunu.

Tað er tilbúgvingarnevndin - fyrr brunanevndin - hjá Tvøroyrar Býráð, har borgarstjórin er formaður, sum politiskt hevur tilbúgvingarpolitikk og tilbúgvingarætlan um hendi, og sum skal gera tilmæli til Býráðið í sambandi við góðkenning av viðfestu uppskotum til tilbúgvingarpolitikk og tilbúgvingarætlan.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Tilbúgvingarnevndin, 10. juli 2017, pkt. 1:**

Nevndin er kunnað um tilbúgvingaætlanina hjá Tvøroyrar Kommunu.
Jaspur Vang skýtur upp, at málið eisini verður tikið upp í Kommunufelagnum, við atliti til at fáa ein felags leist á økinum.
Umboðið hjá Hvalbiar Kommunu, John Hammer, mælir til at fáa stovnar, virkir og feløg í Hvalba við í yvirlitinum.
Bjargingarfelagið v. Claus Olsen tekur undir við uppskotinum til tilbúgvingarætlan.

Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum um tilbúgvingarætlan og tilbúgvingarpolitikk.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt uppskot til tilbúgvingarpolitikk og tilbúgvingarætlan hjá Tvøroyrar kommunu.

### Skjøl

- Uppskot til tilbúgvingarpolitikk og -ætlan, send Lasse og Tummas
- Tilbúgvingarætlan Tvøroyrar kommuna.docx
- Notat frá fundi í dag við umboð fyri Effo
- Kunning frá Hvalbiar kommunu um limir í tilbúgvingarnevnd
- Notat frá fundi um tilbúgvingarætlan hjá Tvøroyrar kommunu
- Innbjóðing til fund, at umrøða tilbúgvingarætlan á Tvøroyri
- Innbjóðing til stuðulseind um fund viðv. tilbúgvingarætlan
- Tilbúgvingarpolitikkur og tilbúgvingarætlan

**27.00.00-6-14**

## 4. Útibarnagarðurin og útbygging av barnagarðinum

### Málsfrágreiðing

Brim arkitektar hava gjørt uppskot til eina nýggja kostnaðarmeting samsvarandi ynskinum hjá sosialu nevnd og Býráðnum um, at gera eina stovu til útibarnagarð afturat verandi uppskoti til



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

útbygging av barnagarðinum.Bygginevndin ger tilmæli, sum umvegis teknisku nevnd verður lagt fyri fíggjarnevndina og Býráðið til støðutakan.

**Sosiala nevnd, 1. juni 2017, pkt. 1:**
Sosiala nevnd mælir til, at tað við støði í núverandi uppskoti til útbygging av barnagarðinum verður fyrireika ein stova afturat til útibarnagarðin, sum verður tilknýtt barnagarðin, men staðsett eitt sindur fyri seg sjálvan. Hetta tilmæli verður beint til víðari viðgerð í Býráðnum.

**Býráðið, 12. juni 2017, pkt. 8:**
Býráðið samtykti einmælt, at taka støðu til, um ein stova skal byggjast uppí verandi uppskot til útbygging av barnagarðinum, tá ein kostnaðarmeting er komin frá Brim Arkitektum.

**Tekniska nevnd, 10. juli 2017, pkt. 7:**

Nevndin tekur undir við tilmælinum frá bygginevndini, og málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin, 12. juli 2017, pkt. 7:**

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá bygginevndini og teknisku nevnd og beinir málið til endaliga støðutakan í Býráðnum.

## Avgerð

Býráðið samtykti einmælt tilmæli frá bygginevndini, at gera eina stovu afturat til útibarnagarð í sambandi við útbygging av barnagarðinum. Henda samtykt er í trá við tilmæli frá sosialu nevnd, teknisku nevnd og fíggjarnevndini.

## Skjøl

- Mýrifipan_Útferð við Bygginevnd_UmStovnar.pdf
- Bræv við svarið til býarverkfrøðingin
- Tilmæli frá bygginevndini



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**24.00.00-I00-1-17**

## 5. Vinnugreinabýti og arbeiðsleys á Tvøroyri 2015/2016

### Málsfrágreiðing

Kunning um A-skattainntøkur býtt út á vinnugreinar, broyting í lønarinntøkum í sambandi við at virksemi á Varðanum Pelagic er fyribils steðga og arbeiðsleys á Tvøroyri 2015 og 2016.

Býráðið tók kunningina til eftirtektar.

### Avgerð

**Býráðið, 12. juni 2017, pkt. 14:**
Borgarstjórin kunnaði um A-skattainntøkur í mun til vinnugreinabýti fyri 2015/2016, sum Býráðið tók til eftirtektar.

### Skjøl

- Útgreining - A-inntøkur á vinnugreinar
- 20170515 Vinnugreinabýtið 2015-16 Tvøroyrar Kommuna.xlsx
- Tøl fyri arbeiðsleys á Tvøroyri 2016
- Broyting í lønarinntøku Varðin - 2.xlsx



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**01.02.05-P24-1-17**

## 6. Broyting av byggisamtyktini í Trongisvági - matr. nr. 144ai og 144ak verða broytt til øki E "almennir stovnar"

### Málsfrágreiðing

Í sambandi við víðkan av barnagarðinum verða matr. nr. 144ai og 144ak broytt frá øki B "bústaðarøki" til øki E "almennir stovnar". Sí viðhefta kort (við tveimum síðum).

Tekniska nevnd ger tilmæli til Býráðið, sum hevur fund 12. juli 2017.

### Tekniska nevnd, 10. juli 2017, pkt. 1:

**Tekniska nevnd, 10. juli 2017, pkt. 1:**
Samtykt at broyta samtyktina soleiðis at matr. nr. 144ai og 144ak verða broytt frá øki B "bústaðarøki" til øki E "almennir stovnar". Sí viðhefta kort (við tveimum síðum)

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd um at broyta nevndu matr.nr. frá øki B til øki E.

### Skjøl

- Barnagarður byggisamtykt

**00.30.18-A00-1-17**

## 7. Eykajáttan juni 2017 - til íløgur



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Málsfrágreiðing

2. viðgerð av eykajáttan til íløgur á kr. 2.529.025,- løgd fram til góðkenningar hjá Býráðnum.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 10:**
Fíggjarnevndin samtykti við 1. viðgerð eykajáttanina til íløgur.

**Býráðið, 12. juni 2017, pkt. 7:**
Kristina Kambskarð Sørensen metti seg ógegniga, at viðgera partar av eykajáttan av íløgum fyri 2017, Tí fór Kristina av fundinum kl. 17:45 í sambandi við hetta pkt. á dagsskrá.

Býráðið samtykti einmælt við 1. viðgerð eykajáttanina til íløgur fyri 2017.

Kristina Kambskarð Sørensen møtti aftur á fundi kl. 17:50.

**Fíggjarnevndin, 12. juli 2017, pkt. 3:**

Fíggjarnevndin samtykti við 2. viðgerð eykajáttanina til íløgur.

**Avgerð**

Býráðið samtykti einmælt við 2. viðgerð eykajáttanina til íløgur 2017.

## Skjøl

- Eykajáttan juni 2017 - samlað yvirlit
- Yvirlit eykajáttan juni 2017
- Sundurgreinan av íløgum



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.30.00-I00-1-17**

## 8. Fíggjarætlan 2018 Bókasavnið

### Málsfrágreiðing

Fíggjarætlan 2018 fyri bókasavnið løgd fram til góðkenningar við tí fyrivarni, at fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar kommunu ikki verður samtykt fyrrenn til heystar.

**Fíggjarnevndin, 12. juli 2017, pkt. 10:**

Fíggjarnevndin mælir Býráðnum til at samtykkja fíggjarætlanina 2018 fyri Bókasavnið við fyrivarni, tí fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar kommuna fyri 2018 verður løgd til rættis til heystar.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt fíggjarætlanina 2018 fyri Bókasavnið við fyrivarni, tí fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar kommuna fyri 2018 verður løgd til rættis til heystar.

### Skjøl

- Átekna fíggjarætlan við fyrivarni

**00.01.10-A00-4-17**

## 9. Endurskoða fíggjarætlan 2017 fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy

### Málsfrágreiðing

Bú- og Heimatænastan við endurkskoðaðari fíggjarætlan fyri 2017, sum fyri Tvøroyrar kommunu inniber ein meirkostnað á 1,048 mió. kr.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Tvøroyrar kommuna setti á fíggjarætlanini fyri 2017 16.720 mió. kr. av til Bú- og Heimatænastuna. Sambært nýggjastu útgreining hjá Bú- og Heimatænastuni fyri 2017, skal Tvøroyrar kommuna gjalda 17.768 mió. kr., sum er ein munur á 1,048 mió. kr., sí viðfestu útgreining.

**Fíggjarnevndin, 12. juli 2017, pkt. 12:**

Fíggjarnevndin mælir Býráðnum til at samtykkja endurskoðaðu fíggjarætlanina hjá Bú- og Heimatænastuni fyri 2017, sum gevur ein meirkostnað fyri Tvøroyrar kommunu á 1.048 mió. kr.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt endurskoðaðu fíggjarætlanina hjá Bú- og Heimatænastuni fyri 2017, og samtíðis ynskti Býráðið skjótast gjørligt, at fáa eina kunning frá leiðsluni á Bú- og Heimatænastuni um virksemi av tænastuni herímillum, hvussu heimatænastan er skipa leiðslumessiga og hvussu heimatænastan virkar í dagligdegnum.

### Skjøl

- Kunning frá Bú- og Heimatænastuni um endurskoðaða fíggjarætlan
- Endurskoðaða fíggjarætlanin 2017.pdf

**00.01.00-A00-14-16**

## 10. Virðis- og visjónstilgongd á Tvøroyri - verkstovur

Umsitingin hevur á starvsfólkafundum í fjør heyst og eitt sindur her í vár umrøtt eina virðis- og visjónstilgongd fyri Tvøroyri, sum hyggur nøkur ár fram í tíðina. Endamálið við einari tílíkari virðis- og visjónstilgongd er at finna út av, hvussu politiska skipanin Býráðið á besta hátt kann menna Tvøroyri fram á leið bæði vinnuliga, mentanarliga og sosialt.

Kommunustjórin hevur toghildið fyri tilgongdini við íblástri frá Ingibjørg Berg og Beintu W. Fossabrúgv, ráðgevum.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Sum sæst í viðfestu skjølum er virðis- og visjónstilgongdin í fýra pørtum, men ætlanin er í fyrsta umfari, at skipa fyri verkstovum fyri starvsfólkum hjá Tvøroyrar kommunu, har starvsfólk skulu seta orð á tey virðir, ið tey leggja fyri dagin í teirra dagliga arbeiðið. Tað er stýrisbólkurin, har borgarstjórin er formaður, sum fyrireikar og stýrir verkstovunum. Virðistilgongdin, sum saman við skrivaða tilverugrundarlagnum fyri Tvøroyrar kommunu, liggur til grund fyri langtíðar-visjónini fyri Tvøroyri, sum Býráðið orðar, væntast ikki at hava nakrar eykaútreiðslur við sær, men kann fíggjast yvir vanliga raksturin.

Kommunustjórin mælir til, at Tvøroyrar Býráð tekur undir við virðis- og visjónstilgongdini fyri Tvøroyri soleiðis sum hon er lýst í viðfestu skjølum.

Virðis- og visjónstilgongdin hevur hildið áfram her í vár, men av ymiskum orsøkum ikki við tí ferð, ið var ætlanin. Men nú aftaná summarferiuna verður fyriskipaðar 7 verkstovur fyri starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu. Ráðgevi Beinta W. Fossabrúgv hjálpir til við at fyriskipa hesar verkstovur, og hevur hon gjørt prísuppskot í sambandi við hennara arbeiði, sí viðfestu bíleggingarváttan.

**Býráðið, 6. april 2017, pkt. 6:**
Býráðið tekur einmælt undir við, at virðis- og visjónstilgongdin fyri Tvøroyri heldur áfram.

**Fíggjarnevndin, 12. juli 2017, pkt. 14:**

Fíggjarnevndin samtykti, at taka undir við prísuppskoti frá Beintu W. Fossabrúgv fyri tær 7 verkstovurnar í sambandi við virðis- og visjónstilgongdina á Tvøroyri. Málið beint í Býráðið til endaliga støðutakan.

**Avgerð**

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini um at taka av prísuppskotinum frá Beintu W. Fossabrúgv fyri hennara ráðgeving í sambandi við tær 7 verkstovurnar, sum skulu avgreiðast í sambandi við virðis- og visjónstilgongdina á Tvøroyri.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 17:00**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Alvi Mortensen

Bjarni Hammer

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 8/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 9/2017 |
| Fundardagur | 12. juli 2017 kl. 16:00-17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan